Vikuskifti

Nr. 70 • fríggjadagur • 7. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

Eli Smith og rullandi atelieri› á bryggjuni í Hanstholm ávegis su›ur gjøgnum Evropa til Spania, har hann skal granska holumálningar

Mynd: Eirikur Lindenskov

Til Pyreneurnar í rullandi atelieri

Eli Smith, listarma›ur úr Havn, er í hesum døgum á fer› su›uri í Spania, har hann fer at granska holumálningar í Pyreneunum. Vi› sær hevur hann rullandi atelieri› – ein gamlan Mercedes frystibil, sum er umbygdur til endamáli›

LISTAMÁLARI Á FER‹

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Hanstholm: Herfyri fór Eli Smith, listamaður í Havn, á eina longri ferð í rullandi atelieri sínum, einum gomlum Mercedes frystibili, sum er umbygdur til endamálið.

– Eg ætli mær til Pyreneurnar at granska 10.000 ára gamlar holumálningar, sigur listarmaðurin, tá vit hittu hann umborð á Norrønu - og aftur á bryggjuni í Hanstholm.

Eli Smith hevur sum listarmaður gjørt serliga nógv við at evna máling úr náttúrutilfari, og tí heldur hann, at holumálningarnir siga honum serliga nógv.

Fyri umleið 35.000 árum síðani, í síðsta skeiðinum av teirri stóru ístíðini, vórðu teir fyrstu evropisku holumálningarnir málaðir. Listagreinin verður eisini nevnd »cantabirska holulistin«, kallað eftir staðnum, har teir vóru funnir í Norðurspania, Altamira og Suðurfrankaríki, Laxcaux í fjallaketuni Pyreneunum á markinum millum Spania og Frakland. Men holumálningar frá ístíðini eru eisini kendir aðrastaðni í Vestur- og Miðevropa.

Málningarnir vóru málaðir beinleiðis á ójøvnu veggirnar í myrkum og illa framatkomuligum holum, har nakrar teirra vóru undir jørð og fyltar við vatni og soleiðis goymdar fyri umheiminum.

Málningarnir ímyndaðu fyri tað mesta tátíðarinnar djóralív. Hesir málningar eru tey fyrstu kendu døminum upp á myndalist við djóra- og veiðimyndevnum, sum eru gjørdir í einum tíðarskeiði upp á í misnta lagi 30.000 ár.

Hetta var byrjanin til eina myndlist, sum hevur røtur heilt upp í okkara tíð.

– Eg eri rættuliga spentur aftur at koma á hesar leiðir. Fyrstu ferð eg var og ferðaðist í Spania var tá eg var 6 ára gamal saman við foreldrunum. So var eg aftur við vinmonnum í 1973, men síðani havi eg ikki verið á hasum leiðum, greiðir Eli Smith frá.

Hann sigur eisini, at Picasso var sera hugtikin av holumálningunum.

– Hann helt, at listin bara var gingin afturá, síðani holumálningarnir vórðu málaðir, sigur Eli Smith skemtandi.

Umframt at granska holumálningar, so ætlar Eli Smith sær á tveir mánaðar longu ferðini eisini at vitja listarliga áhugaverdar býir sum Madrid, Bilbao, Barcelona.

Eli hevur telduna við so, so væntandi frætta vit og lesarar okkara okkurt frá honum á ferðini.

Inni í rullandi atelierinum kann Eli umframt at mála eisini matgera og sova

Mynd: Eirikur Lindenskov

FAKTA

Eli Smith er málari føddur 1955 í Tórshavn

Hann hevur nomi› sær útbúgving á listaháskúlanum í Holbæk.

Í einum tr‡ára tí›arskei›i frá 1994-97 fekst Eli mest vi› at tekna, og gav hann í hesum sambandi út bók vi› kvøldsangum , skr‡dd vi› tekningum og vatnlitsmyndum, sum hann hevur gjørt.

Sí›ani 1997 hevur Eli arbeitt vi› at mála, og ígjøgnum tey seinastu árini hevur hann eksperimentera› vi› at gera máling, vi› at n‡tta farvupigmentir, sum hann finnur úti í tí føroysku náttúruni. Hesir jør›litir eru millum anna› frá roy›ugróti, koli, leiri, skjeljum og ø›rum, sum hann ger til máling vi› hjálp av ymiskum bindievnum. Myndevnini hjá Eli eru ofta at finna ovarlaga í fjøllunum.

Eisini hevur hann ein flytbaran málarabil (myndin) – ein gamal franskur kølibilur – at fer›ast út í náttúruna vi› og nú su›ur gjøgnum Evropa. Á henda hátt er ta›, at íblásturin eisini kemur.